## Bárður fyri Einar

Fyrrapartin gjørdist greitt, at Bárður Olsen úr EB/Streymi skal loysa av Einar Hansen í landsliðshópinum. Vongverjin úr NSÍ fekk álvarsaman skaða í gjár, og hevur miðvallarin úr Sundalagnum fingið landsliðsboð. Bárður Olsen hevur áður spælt ein landsdyst fyri Føroyar. Tískil eru tað nú seks landsliðsleikarar í EB/Streymi, har Marni Djurhuus og Hans Pauli Samuelsen áður hava verið.



*Bárður Olsen*

## Roykiforboð í Gundadali

Borgarstjórin í Havn boðaði í gjár frá, at royking ikki longur er loyvd í skýlunum í Gundadali. Tískil noyðast áskoðararnir burtur frá stóra skýlunum, B36-húsinum og HB-húsinum, um teir vilja festa sær í. Sostatt eru roykireglurnar í Gundadali strangari enn nýggja roykilógin annars leggur upp til. Roykiforboðið stóð í gjár sína roynd í Formuladystinum millum HB og Víking, og sum skilst, hilnaðist væl.

# U21 ger innrás á landsliðnum

**- Vit hava væl vitandi um dugnaligu evnini hjá Andreasi Lava Olsen í longri tíð, og nú hann hevur prógvað seg í Formuladeildini var natúrligt at taka hann út, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari. Saman við fimm øðrum er leirvíkingurin nú í landsliðshópinum, sum seinastu tvey árini hava roynt seg á U21-landsliðnum**

LANDSLIÐIÐ
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*




*- Soleiðis er við øllum úttøkum. Onkur nýggjur fær møguleikan, og aðrir mugu víkja, sigur Jógvan Martin Olsen*
*Savnsmynd*

Tað var av stórum týdningi, at Føroyar fingu eitt U21-landslið, varð sagt í Fótbóltssambandinum. Liðið hevur eisini staðið seg væl í síni fyrstu undankapping higartil, og tað er við stórum spenningi, at hugt verður fram móti komandi uppgávunum. Men tað verður uttan profilarnar.

Jónas Þór Næs, Jóhan T. Davidsen, Leif Niclasen, Einar Hansen, Andreas Lava Olsen og Arnbjørn Hansen hava tað til felags, at teir seinastu tvey árini hava verið partur av U21-landsliðnum. Hesir hava nú fingið landsliðsboð frá Jógvani Martini Olsen.

- Tað hevur verið ein greið gongd, at spælarar á U21-landsliðnum klára seg á A-landsliðnum. Vit hava roynt fleiri leikarar seinastu árini, og nú royna vit hesar við vón um at fáa eitt meira stabilt landslið, sigur landsliðsvenjarin.

### Vitandi um Andreas

Hans Fróði Hansen, fyrrverandi venjari hjá LÍF, gjørdi fyri tveimum árum síðan greitt, at um Andreas Lava Olsen spældi í Formuladeildini, so fekk hann landsliðsboð. Lava-maðurin, sum hann verður róptur, hevur í ár av álvara gjørt um seg í fremstu røð, har hann hevði staðið seg sera væl sum einstaklingur hjá samansetta liðnum úr Leirvík og Gøtu, Víkingi. Nú hevur hann so eisini fingið landsliðsboð fyri fyrstu ferð, saman við Leif Niclasen úr EB/Streymi.

- Vit hava verið væl vitandi um dugnaligu evnini hjá Andreasi Lava Olsen í longri tíð, og nú hann hevur prógvað seg í Formuladeildini var natúrligt at taka hann út. Hann hevur eginleikar, sum vit ikki síggja so nógv av í dag. Kropssterkur og skjótur. Sigfríður Clementsen (venjari hjá EB/Streymi, blaðm.) hevði eisini ein trupulleika í vetur á vinstra vongverjanum, men hóast óroyndur á plássinum, so hevur Leif staðið seg væl. Hann er kvikur og framrættaður, men somuleiðis sum við Andreasi Lava Olsen, so hevur hann nógv eftir at læra.

34 ára gamli Egil á Bø er eisini úttikin hesaferð. Hann skal helst bara styrkja um verjupartin her og nú?

– Tað kann hugsast. Hann hevur verið sera álítandi í verjupartinum hjá EB/Streymi. Vit hava roynt fleiri á hesum plássinum, eitt nú Herbert í Lon Jacobsen. Men tað er einki dulsmál, at vit hava havt trupult við at halda málið reint, og nú royna vit hetta, sigur Jógvan Martin Olsen.

Landsliðsvenjarin hevur eisini tikið út Mikkjal Thomassen úr EB/Streymi. Miðvallarin hevur verið plágaður av skaðum í hesum kappingarárinum, men Jógvan Martin Olsen staðfestir, at Thomassen hóast tað er í góðari venjing.

### Gunnar fær møguleikan

Gunnar Nielsen fekk heldur ikki landsliðsboð hesaferð. Málverjin úr Blackburn hevur roynst serstakliga væl á U21, men framvegis stendur hann í skugganum av Jákupi Mikkelsen og René Torgarð. Men soleiðis verður neyvan leingi aftrat.

– Ætlanin var at hava hann við á ferðini til Estland, men hann var skaddur. U21 hevur tveir dystir eftir í hesu undankappingini, og Gunnar Nielsen fer at verja málið í teimum dystunum. Men tað er eingin ivi um, at hann verður rættiliga aktuellur aftaná tað. Eg haldi ikki, at tað hevði verið rætt at tikið hann framum René Torgarð, sum hevur verið við leingi, men ongantíð fingið møguleikan. Men ætlandi verður hann á vøllinum ímóti Portugal, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sum væntar sær ein sera torføran dyst tann 20. august í Porto.

# Nýggj nøvn í hópinum

**Broytingar eru í landsliðshópinum, og Andreas Lava Olsen, Egil á Bø og Leif Niclasen hava fingið landsliðsboð fyri fyrstu ferð**

LANDSLIÐIÐ
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Ein góðan mánað eftir venjingardystin ímóti Estlandi hevur Jógvan Martin Olsen aftur sett navn á teir 18 spælararnar, sum hann hevur kosið sær til komandi avbjóðingina í Portugal. Ein dystur, sum tolir sammeting við Týskland, Italiu og Frakland, um tosast skal um størstu avbjóðingarnar, sum fótbóltslandsliðnum hevur staðið í boði.

### Nýggj nøvn

Talan var um óvæntaðar broytingar í hópinum. Í mun til dystin seinast eru Leif Niclasen, Egil á Bø og Andreas Lava Olsen nýggir í landsliðshópi. Hesir hava gjørt vart við seg í landskappingini í ár, undantikið Egil á Bø sum seinnu árini hevur verið álitið í verjuni hjá EB/Streymi saman við Marna Djurhuus.

– Soleiðis er við øllum úttøkum. Onkur nýggjur fær møguleikan, og aðrir mugu víkja, sigur Jógvan Martin Olsen.

Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen verða ikki tøkir. Verjuleikarin úr Frem hevur givið avboð vegna lestur, og orsaka av felagskifti metti hann seg ikki verða til reiðar til landsliðið. Súni Olsen er skaddur. Hóast fuglfirðingurin Áki Petersen ikki fekk landsliðsboð hesaferð, so er møguligt, at hann verður við í ferðalagnum kortini. Einar Hansen fekk álvarsaman skaða í landskappingardysti í gjár, og avloysari skal eftir øllum at døma finnast.

René Torgarð er framvegis annar málverji á landsliðnum. Landsliðsvenjarin hevur heldur ikki hesaferð tikið Gunnar Nielsen úr Blackburn við á sokallaða læruplássið á málmanssessinum.

### Tem úti

Ein triðja broyting er eisini í hópinum. Danin Tem Hansen, sum hevur ættarbond í Føroyum, verður ikki við í Portugal. Miðvallarin hevur verið skiftandi í føroyska hópinum, og hóast hann var við frá byrjan í Estlandi, so er hann ikki úttikin hesaferð. Kári Nielsen er heldur ikki við.

EB/Streymur hevur fimm leikarar við hesaferð, og tað er metstórt. Miðvallarin úr Sundalagnum, Bárður Olsen, hevur verið sera eyðsýndur í hesum kappingarárinum, og hann er uttan iva aktuellur hjá landsliðsvenjaranum. Men hesaferð var stríðsmaðurin Høgni Madsen úr ÍF valdur framum.

## FAKTA

**Hópurin:**

| | |
|---|---|
| Málverjar: | |
| Jákup Mikkelsen | KÍ |
| René Torgarð | EB/Streymur |
| Verjuleikarar: | |
| Jónas Þór Næs | NSÍ |
| Jóhan T. Davidsen | NSÍ |
| Einar Hansen (Bárður Olsen, EBS) | NSÍ |
| Egil á Bø | EB/Streymur |
| Leif Niclasen | EB/Streymur |
| Fróði Benjaminsen | HB |
| Atli Danielsen | Frem |
| Miðvallarar: | |
| Høgni Madsen | ÍF |
| Mikkjal Thomassen | EB/Streymur |
| Jákup á Borg | B36 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur |
| Símun Samuelsen | Keflavík |
| Framherjar: | |
| Christian Høgni Jacobsen | AB |
| Arnbjørn Hansen | EB/Streymur |
| Rógvi Jacobsen | KÍ |
| Christian Lamhauge Holst | Lyngby |